


Fyri 35 árum síðan:

# Toyota Crown tikin av vindi

Í myndaárbókini Árið ið fór frá 1974 er hendan myndin frá november 1973, tá ið rættuligt ódnarveður var kring landið. Hendingin fór fram í Gøtu, har ein Toyota Crown, ið stóð parkeraður aftan fyri ein Volvo 144, varð syftur upp um Volvo bilin og lendi á einum garði og á takinum á Volvo bilinum sum harafturímóti ikki hevði flutt seg. Sum myndin vísir, er tað ikki nakar lítil bilur, ið soleiðis er viðfarin. Ein Toyota Crown vigaði umleið 1300 kg.

Um miðjan november 1973 var annars rættuligt ódnarveður kring landið. Á flogvøllinum í Vágum, har mált varð uppí vindmegi 15, fór tekjan av nýggja garagubygninginum. Á Oyggjarvegnum fuku fleiri bilar út av vegnum, og í summum bygdum fóru tekjur omanav húsunum. Bæði í Hoyvík og í Gøtu rapaðu tvey nýliga reist hús.

*Kelda: Myndaárbókin – árið ið fór 1974*

# Himin mær í favn

*SEQ CHAPTER \h \r 1Hvør gav ljós til stjørnu,*
*sum sæst í tínum eyga,*
*læt í náttarmyrkri*
*hirðar síggja himins ljós,*
*setti eina krúnu*
*av strái um títt enni,*
*leiddi tríggjar kongar*
*inn til tín, í hetta fjós?*

*Ert tú eins og onnur smá?*
*Ert tú tann, tey stunda á?*
*Tú mítt lítla barn, ein eingil gav tær navn.*
*Man eg verja hesa nátt*
*alt tað, sum er dýrt og gott?*
*Er tað himin sjálvur, sum eg ruri mær í favn?*

*Hvør ger teg so bangnan,*
*at hjarta títt tað grætur,*
*hond tín tekur fast*
*í hár á mammu, lítli tú?*
*Sært tú, skuggar dansa?*
*Eingilin er farin,*
*hann segði so nógv vakurt,*
*sum eg ikki skilji nú.*

*Gævi, tínir dagar,*
*teir geva øðrum gleði,*
*gævi, at øll møta*
*tær við kærleiks mildu reyst.*



*Aldri skal eg gloyma*
*tey orð, eg fekk at hoyra.*
*Hvat so okkum hendir,*
*verða tey til mót og treyst.*

*Hvør gav ljós til stjørnu,*
*sum sæst í tínum eyga?*
*Himins diamantur*
*yvir býnum Betlehem.*

*Orð: Erik Hillestad. Lag: Carola*
*Jákup Reinert Hansen umsetti 20. nov. 2008*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Ása Turið Niclassen**, ættað úr Froðba, búsitandi á Hafnafirði í Íslandi, andaðist mikudagin á Landssjúkrahúsinum í Reykjavík, 65 ára gomul. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Jóhan Hammer**, ættaður úr Gøtu, búsitandi Vartdal i Noregi, andaðist hóskvøldið, 75 ára gamal. Jarðarferðin verður hósdagin úr kirkjuni í Vartdal.

**Sjúrður Skála, Tórshavn**, andaðist hósdagin, 96 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Kirkjugarðskapellinumtýsdagin 2. desember klokkan 14.

**Helga Johannesen av Sandi** andaðist 28. november, 92 ára gomul. Jarðarferðin verður lýst seinni.

†

Okkara kæri bróðir

**Sjúrður Skála**

andaðist 27. november, 96 ára gamal.
Jarðarferðin verður úr Kirkjugarðakapellinum tann 2. des. kl. 14.00.

*Vegna tey avvarðandi*
**Nanna og Tóra**

Tey, ið vilja minnast Sjúrð, kunnu lata Hests kirkju eina gávu, konta í Eik Banka

## Tøkk

Øllum tykkum - ungum og eldri - sum á so vakran hátt sýndu vinskap tykkara á diamantbrúdleypsdegi okkara, bera vit bestu takk.

Samstundis ynskja vit tykkum vælsignað kirkjuár og gleðilig jól við Guds signing.

**Brynhild og Johs. Andr. Næs**

**Dagurin**
**1. desember. Arnaldur.** Er eitt av teim elstu nøvnunum í halgramanna tali, tað er eitt sindur tvørligt at fáa skil á, hvør hesin Arnaldur hevur verið. Fleiri við sama navni verða nevndir, og teir flestu halda, at her verður sipað til ein franciskanaramunk, sum fór til Kina í 1303 sum trúboðari. Navnið er gamalt týskt, sett saman av arn, sum merkir ørn og wald, ið merkir tað sama sum føroyska orðið vald ella hersi.